Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Hvítvask í Føroyum

Spurningar:

1. Hvussu nógv mál um hvítvask hava føroysku peningastovnarnir fráboðað til løgregluna seinastu 5 árini?
2. Í hvørjum vinnugreinum í Føroyum verður hvítvask fráboðað?
3. Hvussu mong av hesum málum eru blivin kannað nærri av løgregluni, og hvussu nógv eru endað við sakarmáli?
4. Hvussu long er viðgerðartíðin av føroyskum fráboðanum um hvítvask hjá løgregluni?
5. Hvussu long er viðgerðartíðin av donskum fráboðanum um hvítvask?

Viðmerkingar:
ES-fyriskipanir um hvítvask verða javnan settar í gildi í Føroyum – bæði á yvirtiknum og ikki yvirtiknum málsøki. Seinast á vári í 2023.

Hvidvasksekretariatet, sum er partur av National Enhed for Særlig Kriminalitet hjá donsku løgregluni, almannakunngjørdi í januar 2023 eina váðameting fyri hvítvask í Føroyum. Í váðametingini varð sagt, at tað verður mett at vera stórur vandi fyri, at Føroyar verða brúktar í sambandi við hvítvask.

Danska fíggjareftirlitið hevur eisini biðið føroyskar peningastovnar um at kanna mannagongdir og innanhýsis eftirlit fyri at fyribyrgja hvítvask og fígging av yvirgangi.

Áhugavert hevði verið at vitað, júst hvussu stórur trupulleikin við hvítvaski er í Føroyum, innan hvørjar vinnugeirar fráboðanirnar koma, og hvussu hesar verða handfarnar av donsku myndugleikunum. Tí hesir spurningar.

Á Løgtingi, 2. august 2024

Liljan Weihe